VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 5 og 8 stig.



Veðrið hósdagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og regn. Seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av suðri og vátaslettingur, sunnudagin snarar hann í útnyrðing við kavaælingi. Hitin millum frostmarkið og 4 stig.

Sp/f Eyðbjørn Hansen:

Suzuki nr. 50 til Postverk Føroya

Síðan 1987 hevur Sp/f Eyðbjørn Hansen latið 50 nýggjar jeepar til Postverk Føroya. Mánadagin 15. mars handaðu teir bil nr. 50, sum fór til posthúsið í Vestmanna

BILAR
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo

Postverk Føroya hevur brúk fyri nógvum ymiskum flutningstólum til teirra ymisku tænastur. Til at koyra postin av høvuðsposthúsinum út á tær ymisku bygdirnar, verða stórir lastbilar við kassa nýttir. Til útbering millum húsini í Havn brúka teir skutarar, og økispostboðini brúka so Suzuki jeeparnar, sum eru væl kendir um alt landið. Annars hava teir eisini bilar av nógvum ymiskum merkjum.

At Postverkið av fyrstan tíð keypti Suzuki, komst av at teir vóru bíligir at keypa og vóru arbeiðsligir og léttir at handfara. Eisini tað at teir høvdu fýrahjólsdrift og kundu koma í hvønn krók í landinum í øllum veðri. Í sambandi við útberingina hevur tað stóran týdning, at tað er lætt at koma inn og úr bilinum.

Sverri Viderø, deildarleiðari hjá Postverki Føroya, sigur, at tað er eftir ynski frá økispostboðunum, at teir framvegis brúka Suzuki jeeparnar, sum teir hava sera góðar royndir av. Teir eru framvegis bíligir at keypa og í drift og væl egnaðir til endamálið.

Suzuki bilur nr. 50 frá Sp/f Eyðbjørn Hansen, ein Grand Vitara til posthúsið í Vestmanna. Á myndini eru: Eyðbjørn Hansen, Suzuki umboðsmaður, Sigrun Danielsen, økispostboð í Vestmanna, og Sverri Viderø, deildarleiðari hjá Postverki Føroya. Sp/f Eyðbjørn Hansen læt blómur til Postverkið hendan dagin
Mynd: Álvur Haraldsen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	÷16
Nuuk	÷8
Qaqortoq	0
Ammassalik	0
Saint John's	÷1
Halifax	1
Reykjavík	6
Seyðisfjørður	2
Tórshavn	8
Lerwick	8
Aberdeen	11
London	12
Tromsø	1
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	4
Keypmannah.	9
Helsinki	1
Moskva	2
Berlin	13
Warzawa	11
Kiev	4
Bukarest	11
Paris	13
Madrid	16
Róm	15
Malorca	15
Athen	14
Malta	15
Tunis	17
Beijing	11
New Dehli	32
Bangkok	33
Jakarta	32
Sydney	–
New York	12
Miami	25
Los Angeles	15
Meksikobýur	–
Panama	32
La Paz	17
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	27

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 987 hPa. vestan fyri Skotland fer í landnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum týskvøldið.



Lágtrýstið norðan fyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og sunnan fyri lágtrýstið rekur kaldari luft móti Føroyum.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 15/03 kl. 06⁰⁰– 16/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,3°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 10,0 mm – mált frá 15/03 kl. 06⁰⁰–16/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 47,4 mm

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG

12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo

VESTFALLSKYRRINDI

12. mars: Mánin næstur jørðini
13. mars: Seinna kvarter
20. mars: Tendring

Kelda: Almanakkin 2004

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
17. mar	03.47	16.14	02.47	15.14	03.02	15.29	05.47	18.14	06.47	19.14	02.02	14.29	01.02	13.29	04.02	16.29	05.02	17.29	03.32	15.59	04.47	17.14
18. mar	04.39	17.03	03.39	16.03	03.54	16.18	06.39	19.03	07.39	20.03	02.54	15.18	01.54	14.18	04.54	17.18	05.54	18.18	04.24	16.48	05.39	18.03
19. mar	05.27	17.50	04.27	16.50	04.42	17.05	07.27	19.50	08.27	20.50	03.42	16.05	02.42	15.05	05.42	18.05	06.42	19.05	05.12	17.35	06.27	18.50
20. mar	06.12	18.33	05.12	17.33	05.27	17.48	08.12	20.33	09.12	21.33	04.27	16.48	03.27	15.48	06.27	18.48	07.27	19.48	05.57	18.18	07.12	19.33

5 707265 100036 >